# ðin vann



Uppá allar mátar vóru GoGo Blues í einum klassa fyri seg í Fuglafirði

millum skeivu sløgini hjá Rógva á Rógvu. Variatiónirnar vóru nógvar og góvu greið prógv um, at blues ikki nýtist at vera einstáttað.

Við teirra drúgvu royndum kundi ein verið bangin fyri, at teir fóru at taka sær av løttum, men so var ikki. Gleðin við at spæla kom týðiliga til sjóndar, og tað var eisini eyðsýnt, at tað ávirkaði teir positivt, at fólk tóku so væl ímóti orkufulla og vælsmurda blues tónleikinum. Við lagnum "I'm Gone" settu teir veruliga prikkin yvir i'ið og gjørdu ein rimmar enda á eini fantastiskari framførslu.

## Ungir og harðir

Næstseinast á pallin vóru Paradox. Einans 15 og 16 ára gamlir trinu teir á pallin sum um tað var gerandiskostur. Ok, eitt sindur av "helgens hetta er feitt" sást á andlitsbránum, tá fólk heppaðu á teir niðri í salinum, meðan teir gjørdu seg klárar á pallinum. Eisini sást týðiligt, hvussu ágrýtnir og hugaðir teir vóru at sleppa í gongd.

Hóast ungir á aldri, so høvdu teir roynt at staði á palli fyrr — m.a. í Margarinfabrikkini í Havn og á ólavsøkukonsertini (sum vinnari av pop-top konsertini). Og hetta sást. Har var eingin slingur í valsinum: Við stoltari rødd byrjaðu teir hart og kontant við lagnum "Lost my Pride". Heavy-rokkurin floymdi út úr hátalarunum og legði lunnar undir snjøllu, men góðu røddina hjá Heina Gilstóne Corfitz Andersen.

Sangirnir vóru rættuliga góðir og nógv góð hugskot vórðu roynd. Millum annað varð kryddað við einum sera feitum guitarriffi í lagnum "New Day", ið eisini var tað mest melidiøsa lagið. Eisini høvdu teir góð breaks inn í millum, og sum heild var tað ein góð og orkufull framførsla, sum Paradox gav áhoyrarunum. Onkrastaðni kundi tað kanska svingað betri, men teir megnaðu veruliga at fáa lív í áhoyrarnar í salinum, og tað var eitt stórt pluss.

Tað er eingin ivi um, at limirnir í Paradox hava potentialið. Um tað verður sum bólkurin Paradox, ella teir finna aðrar leiðir, fer tíðin at vísa.

## Eldri og enn harðari

Sum seinasti bólkur komu SIC inn á pallin við døkkum eygum og ringum í vørrini. Tað var eingin loyna, at nú skuldi tað tunga og tað harða veruliga buldra úr hátalarunum. Og tað gjørdi tað, so tað stóð eftir. Tónleikaliga framførslan hjá SIC var sera góð og neyv, og teir megnaðu veruliga at fáa lív í meginpartin av áskoðarafjøldini. Serliga lagið "Rough" var gott, tí tað var rættuliga varierandi. Í hesum lagnum varð rúmd funnin í tjúkka ljóðmúrinum fyri einari pinkulítlari solo og nokk so nógvum sangi.

Hini løgini náddu ikki heilt somu hædd. Ikki tí, grundleggjandi vóru tey allright, men tað kundi verið arbeitt meira við variatión og detaljum, hóast trash-metal fyrst og fremst skal flyta, um ikki fjøll, so tunga luft.

Nógv fólk hava ta fatan, at tá ið tað snýr seg um trash-metal, ja so skal sangarin bara standa og skrála so hart og vilt sum til ber. Men tað er ikki heilt rætt. Ella jú, hann skal kunna skrála bæði høgt, lágt og hart, men tað setir samstundis sera stór krøv til ein trash-metal sangara og røddina hjá honum. Tað torføra er ikki at rópa og skrála, men samstundis hava stýr á hesum. Eisini skal eitt skrál halda tónan. Viðhvørt skal sangarin so eisini veruliga skrála garvilt, fyri síðani brádliga at fara beinleiðis til sang. Alt hetta megnaði Mikkjal Gaard Hansen til eitt reint 13 tal, og hann var eisini ein góður frontfigurur í aðrar mátar við sínum livandi rørslum.

Møguliga kundi SIC tó verið enn meira villir á pallinum, enn teir vóru, og gjørt enn meira burturúr upp á onkran máta, men sum heild var tað ein tung, rá og sterk framførsla.

## Vælevdnað tiltak

Tikið samanum var dygdin á teim ymisku framførslunum sera góð í hesum fyrsta undanumfarinum. Eisini ljóðgóðskan og ljóðblandingin var góð, umframt skiftandi og spennandi ljósi, sum setti dám á pallin.

Áhoyrararnir fingu tað, teir vóru komnir eftir, nevnliga góðan og fjøllbroyttan tónleik og fólk vóru í góðum lag. Tað er sagt fyrr, men tolir væl at verða endurtikið: Mentanarhúsið í Fuglafirði hevur júst røttu støðd og innrættan til eitt tilíkt tiltak. Spennandi verður tískil at hoyra og síggja, hvussu hini trý undanumførini fara at hepnast.



Framførslan hjá DejaVu var ikki nakað serliga broytt í mun til tað fyri tveimum árum síðani



Heavy-rokkurin floymdi út úr hátalarunum, tá ungu menninir í Paradox trinu á pallin